# Spæla um pláss í meistaradeildini

**Leygardagin í næstu viku verður tað avgjørt, um tað verður SÍ ella Fleyr, sum fara at vinna sær sætta og seinasta plássið í meistaradeildini hjá kvinnum komandi kappingarár**

UPP- OG NIÐURFLYTING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað er longu greitt, at SÍ endar á aftasta plássi í meistaradeildini hjá kvinnum í flogbólti. Hetta merkir, at sørvágskvinnur skulu spæla um upp- og niðurflyting móti fremsta liðnum í 1. deild.

**Fleyr greiður vinnari av 1. deild**

Kvinnurnar hjá Fleyr, sum í fjør fluttu úr meistaradeildini, hava langt síðani vunnið kappingina í 1. deild, og tað verða tí tær, sum skulu spæla móti SÍ um plássið í bestu deildini.

Flogbóltssamband Føroya hevur nú ásett, at upp- og niðurflytingardysturin millum kvinnuliðini hjá SÍ og Fleyr skal spæla leygardagin 26. mars klokkan 15.00 í Hoyvíkshøllini, og tá fæst so greiði á, um tað verður SÍ, ið framhaldandi fer at verða í fremstu deildini, ella um kvinnurnar hjá Fleyr endurvinna sær sess millum tær bestu.



*Kvinnurnar hjá Fleyr hava leygardagin í komandi viku møguleika at endurvinna sær sessin í bestu deildini, so at tær aftur kunnu dystast við eitt nú TB*

*savnsmynd*

# Frem tapti í seinastu royndini

**Jón Rói Jacobsen spældi allan dystin, tá ið Frem mánakvøldið hevði seinastu dystarroyndina undan fyrsta dystinum í Viasat Sport kappingini, sum fer av bakkastokki aftur um vikuskiftið**

ÚTISETI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Mótstøðuliðið hjá Frem mánakvøldið var AB, sum eisini spælir í Viasat Sport kappingini. Jón Rói var sum vant í miðverjuni hjá Frem, og hann kundi fegnast um, at Frem legði seg á odda 1-0. Men akademikararnir úr AB vóru treiskir, og tá ið avtornaði vann AB dystin 2-1.

Ungi føroyski málverjin hjá Frem, Gunnar Nielsen, sat á beinkinum allan dystin. Ein annar føroyingur er sáttmálabundin í Frem, og tað er Jónas Tór Næss, sum tó ikki var við í hópinum mánakvøldið.

Fyrsti dysturin hjá Frem í Viasat Sport kappingini eftir vetrarsteðgin verður sunnudagin, tá ið teir fáa vitjan av Ølstykke. Lítið man verða at ivast í, at føroyski landsliðsmaðurin Jón Rói Jacobsen verður í miðverjuni hjá Frem frá byrjan.

Nú kappingin fer í gongd aftur, liggur Frem næstfremst í Viasat Sport deildini, og eydnast tað liðnum at halda fast í hesum plássi, er uppflytingin til Superligaina tryggjað.



*Føroyski landsliðsmaðurin Jón Rói Jacobsen verður ivaleyst millum teir fyrstu ellivu, tá ið lið hansara BK Frem sunnudagin aftur leggur til brots í Viasat Sport kappingini í Danmark*

*savnsmynd*

# Andrew fekk ein hálvleik

**Leygardagin spældi Fremad Amager seinasta venjingardystin, áðrenn farið verður undir seinnu hálvu av landskappingini í næstfremstu donsku deildini. Andrew av Fløtum var við hjá Fremad Amager eftir steðgin**

ÚTISETI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Líkt er ikki til, at Andrew av Fløtum fer at teljast millum teir fyrstu ellivu á liðnum hjá Fremad Amager, sum í næstum fer undir seinnu hálvu av kappingini í Viasat Sport deildini.

**Brendi gyltan møguleika**

Leygardagin spældi Fremad Amager venjingardyst móti Skjold, men Andrew av Fløtum taldist heldur ikki hesaferð millum teir fyrstu ellivu. Føroyski landsliðsframherjin kom tó á vøllin í steðginum, og bert tveir minuttir seinni hevði hann ein gyltan møguleika at leggja Fremad Amager 1-0. Andrew gjørdist leysur við málverjanum hjá Skjold, men tá ið hann skuldi lyfta bóltin upp um málverjan, rakti Andrew ikki bóltin nóg neyvt, og so var tann møguleikin burturspiltur.

Úrslitið av venjingardystinum gjørdist 1-1.

Sunnudagin verður farið undir Viasat Sport kappingina, og fyrsta avbjóðingin hjá Andrew av Fløtum og Fremad Amager verður móti landsliðsfelaganum Johan Byrial Hansen og AC Horsens, ið eru á odda í kappingini, á heimavølli.

# Tveir kvinnudystir í kvøld

Í meistaradeildini hjá kvinnum í flogbólti verða tveir dystir á skránni í kvøld. Dysturin millum oddaliðið Mjølnir og botnliðið SÍ, sum skuldi verða farna vikuskiftið, men bleiv útsettur fyri veður, verður ístaðin leiktur í KÍ-høllini í kvøld. Um Mjølnir vinnur dystin móti sørvágskvinnum í kvøld, endurvinna tær samstundis oddasessin frá TB.

Hin dysturin verður í Hoyvík, har heimaliðið KÍF fær vitjan av Drátti.

**tn**

# Tjaldur-VÍF í kvøld

Dysturin í Sunset-kappingini millum Tjaldur og VÍF, sum skuldi verið leiktur sunnudagin, men sum bleiv avlýstur fyri veður, verður ístaðin leiktur í Runavík í kvøld. Sunnudagin var ikki mett ráðiligt, at kvinnurnar úr Vestmanna skuldu fara til Runavíkar í øllum kavaveðrinum, og tí samdust feløgini um at útseta dystin. byrjar klokkan hálvgum átta í kvøld.

**tn**